# Góði Bob

**Tekstirnir eru algloypandi. Ikki hvør tekstur hvør sær, men listarliga lívsverkið í síni samansettu heild. Við egnari dagsskrá hevur tú ferð eftir ferð stevnt móti nýggjum leiðum og skrivað sangir um tað at vera**

Ja, so hittast vit enn einaferð. Tú á tíni endaleysu ferð kring heimin og eg á míni ferð í tínum óskiljandi, men samstundis læruríka og hvassa hugaheimi. Og eg gleði meg, tí tú hevur um nakar sett orð og tónar til mínar fløkjaligu tankar og allar lívsroyndirnar, ið eg ongantíð havi skilt. Hvussu kennist tað, at ávirka onnur á so ítøkjuligan og máttmiklan hátt? Hvussu kennist tað at vera fremsta og vísasta røddin hjá fleiri ættarliðum? Hvussu kennist tað at geva so nógvum so nógv, og fært tú naka aftur fyri? Spurningarnir eru nógvir. Hevur tú svarini, og um so er, hvørji eru tey? Eg fái ikki svar á hesar mongu spurningar, tí tað hevur ongantíð ligið tínum hjarta nær at svara spurningum frá øðrum. Spurningarnir – vinur mín – flákra onkustaðni í óstøðuga vindinum. Tí er tað mestsum burturspilt tíð at leita eftir fanginum á djúpa loyndarmáli tínum.

Eg standi spyrjandi og undrist á, hvør drívmegin er. Tú hevur sæð fleiri partar av heiminum enn vit vanligu deyðiligu síggja, men kortini heldur tú á fram og fert á pallin nakrar fáar metrar frá mær og hinum, ið lurta og royna at skilja. Hetta er onkursvegna í trá við anda tín. Tá tú setti ravmagn í gittaran í 1965 skilti so at siga eingin tín framferðarhátt, og tá tú fekk samband við hann sjálvan í erva, tá vóru nógv, ið vendu tær bakið. Men hjá tær er eingin vegur heim. Tú steðgar ongantíð á, men flytur teg nýggj støð við nýggjum yrkingum og nýggjum boðskapum. Og vit royna at fylgja við. Men eg undrist, tí er nakað, ið vit ikki hava skilt - tónar, vit ikki hava hoyrt? Latum okkum kalla hetta ein retoriskan spurning, tí um nakrar fáar vikur kemur enn ein útgáva frá tær.

Tú ert fyrst og fremst ímyndin av amerikanska dreyminum. Tú fekst meg at fata, hvør amerkianski dreymurin í veruleikanum er, og allar teir møguleikar, ið alt ov fá taka. Tá ein tíðindamaður spurdi, hví tú skifti navn, so var títt gløgga svar sera einfalt, men eisini sigandi: "Tú kanst nevna teg tað, ið tú ynskir at nevna teg. Hetta er landið hjá teimum frælsu." Jú, so er. Amerika gav tær markleysar møguleikar, tí við hugburðinum "alt ber til" ber alt til. Við tínum tonkum gevur tú orðum sum frælsi, menning og váðafýsni innihald, og samstundis verður amerikanski dreymurin ítøkiligur. Sjálvsagt eru skuggasíður og tíðarskeið, tá samfelagið snávaði, men amerikanski dreymurin er handan allan iva. Hinvegin hevur tú sprænt upp í spannir av orðagalli yvir náðileysar valdsharrar og teirra týnandi skipanir. Ein ævig og neyðug mótmynd.

Tínar útgávur avmarka seg á ongan hátt til eitt ávíst tíðarhvarv. Tekstirnir eru algloypandi. Ikki hvør tekstur hvør sær, men listarliga lívsverkið í síni samansettu heild. Við egnari dagsskrá hevur tú ferð eftir ferð stevnt móti nýggjum leiðum og skrivað sangir um tað at vera. Tjúgu ár áðrenn eg var borin í heim, sang tú um, at tíðirnar broytast, og nú fimogfjøruti ár seinni ber til at líta aftur um bak og staðfesta, at heimurin ongantíð áður hevur sæð so djúptøknar broytingar. Ferðin er ógvuslig og tíðarskeiðið stutt. Hvaðani kemur Obama? Jú, hann er ein ítøkilig mynd av amerikanska dreymin. Men tú hevur ongantíð havt eina paternalistiska tilgong til umheimin og hevur ongantíð havt eitt normativt útgangsstøði. Hinvegin vísir tú, at alt byrjar við egnari sjálvsmensku, at tað loysir seg at vera trúgvur móti sær sjálvum og vera á rundferð alt lívið. Tú vísir somuleiðis – á sama hátt sum amerikanski dreymurin – at vit menniskju hava egnar dreymar at taka atlit til. Um tú eltir tínar, so elti eg mínar.

Óvissan er treytað lívskor, og hendan sannkenning er einans við til at bjóða verandi sannleikum av. Tú hevur við speisemi og frástøðu vent heimin á ranguna. Hetta hevur tú megnað við at finna tað næra í tí fjara; at tikið tað algilduga og gjørt tað viðkomandi, hóast tað í fyrstu atløgu var óskiljandi. Á sama hátt fekk eg so at siga einki burtur úr fyrstu konsertini. Eg skilti ikki, at eg ikki skilti teg, tí eg hevði hoyrt, at tú vart millum teir allar størstu. Tú vart skýggin og kom á ongan hátt gjøgnum annars veika múrin av ungdómligum forvitni. Seinni skilti eg alt betur. Tú vart eins og kaffi. Tillagingartíðin var rættuliga drúgv, men so smakkaði tú hinvegin av meira, tá eg vandi meg við smakkin. Og nú drekkur mítt vit dagliga av ótømandi brunni tínum. So halt á fram Bob, tí mannaættin hevur brúk fyri at síggja heimin við øðrvísi eygum. Mannaættin tørvar eina veruliga hetju. Tú ert mín hetja.

